## Enn eitt pláss skeiva vegin

Føroyska A-landsliðið í mansfótbólti er aftur dottið eitt pláss aftur á heimsstyrkislistanum, sum FIFA kunnger eina ferð um mánaðin. Føroyar er dottið eitt pláss aftur síðan seinastu meting, og liggur nú nummar 195. Til samanbering kann sigast, at Somalia, Cayman Islands, Mongolia, Myanmar, Pakistan, Afganistan og onnur ókend fótbóltslond liggja omanfyri landslið okkara. Tó kann leggjast afturat, at slík lond vinna flestu stigini í vinardystum.



## Claus tapti fyri Southampton

Blackpool, sum spælir í næstbestu ensku fótbóltsdeildini, tapti leygardagin ímóti Southampton. Dysturin var á útivølli, og Southampton fekk einasta málið í dystinum. Tað skoraði Stern John í fyrra hálvleiki. Fyrrverandi føroyski landsliðsspælarin Claus Bech Jørgensen byrjaði á vøllinum, men hann varð tikin út 20 minuttir fyri leiklok. Blackpool byrjaði kappingarárið væl, men er nú farið at nærkast botninum. Liðið liggur fjórðniðast eftir 17 umfør.

# Hickersberger gleðir seg

**Hóast hann fyri stuttum noktaði Jens Martin Knudsen pláss á einum All-Star liðið, so sigur eysturríkski landsliðsvenjarin seg nú gleða seg til at hitta Føroyar aftur**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

– Føroyar kenni eg. Eitt frálíkt lutakast, og eg gleði meg at síggja teir aftur.

Soleiðis segði eysturríkski landsliðsvenjarin, Josef Hickersberger. Maðurin, sum fekk sekkin alt fyri eitt, tá Føroyar fyri góðum 17 árum síðani vunnu søguliga sigurin í Landskrona.

Men tað er eingin ivi um, at Hickersberger hevur alt annað enn góð minni um Føroyar. Bæði sum spælari og venjari varð Hickersberger mettur millum teir fremstu í Eysturríki. Men innan venjarayrkið fekk navn hansara ein døkkan blett á seg eftir Landskrona. Hóast hann tey næstu árini vandi Fortuna Düsseldorf og Austra Wien, so megnaði hann als ikki á sama hátt sum fyrr at leiða lið síni til sigurs.

Frá 1994 virkaði hann sum venjari í Bahrain, har vandi bæði landslið og yngri spælarar, og tað var ikki, fyrr enn hann í 2002 kom aftur til Eysturríki, at hann veruliga vann seg aftur á tindarnar. Fyrst sum venjari hjá Rapid Wien, sum við nýggja venjaranum vann fyrsta meistaraheitið í níggju ár, og sum eisini vann seg í Champions League kappingina, har teir tó máttu lúta fyri Bayern München, Juventus og Club Brügge.

### Tungt at vinna álit

Góðu avrikini í Wien gjørdu tó, at boð aftur vóru eftir Hickersberger frá eysturríkska fótbóltssambandinum. Tá landið á sinni tapti fyri Føroyum, vórðu teir hvítu annars at rokna sum eitt lið í hægra europiska miðalklassanum. Og teir høvdu eisini júst verið partur av HM-endaspælinum í Italia.

Tað tók Eysturríki átta ár at koma fyri seg, men tað tóktist boða frá góðum, tá teir vunnu seg í endaspælið í 1998. Árið eftir vunnu teir seg enntá heilt upp á 17. plássið á FIFA-styrkislistanum, men helt nakar, at fótbóltstjóðin nú var komin fyri seg, so fór viðkomandi so dyggiliga skeivur. Svíðandi stórtap móti Spania (9-0) og Ísrael (5-0) tóku fast, og seinastu átta árini hevur landið verið at kalla í fríum falli á styrkislistanum.




*Josef Hickersberger sigur seg fegnast um, at hann aftur sleppur at hitta Føroyar. Heilt samdur er Ole Andersen tó ikki. Danin, sum hevur virkað sum venjari hjá fleiri føroyskum feløgum, sendi okkum hesa tekningina eftir lutakastið*

Eysturríki er nú nummar 91 á styrkislistanum hjá FIFA – aftan fyri eitt nú Letland, Ísland og Armenia - og tað setti teir í næst niðasta styrkisbólkin, tá lutakastið var á skránni í Durban í gjár.

Setningurin hjá Hickersberger er fyrst og fremst at endurvinna álitið á fótbóltin í Eysturríki, men í løtuni gongst einki serligt við tí. Eysturríki er tó partur av EM-endaspælinum, men hetta er sum vertstjóð. Og í onkrum av fjølmiðlunum hevur verið róð uppundir, at landið eigur at frásiga sær luttøkuna, tí liðið als ikki hevur nakað at gera í hesum høpi.

## Skoraðu í yvirtíðini

Við seinastu HM-luttøku sínari í 1998 setti Eysturríki eitt merkisvert met. Liðið vann seg ikki víðari úr bólkaspælinum, har teir endaðu aftan fyri Italia og Chile. Men tað merkisverda var, at landið í øllum trimum dystunum skoraði eitt mál, og at hetta hvørja ferð kom í yvirtíðini. Móti Cameroon javnaði Toni Polster til 1-1, eftir at Pierre Njanka við einum framúrskarandi máli helst seg hava sent afrikanararnar á sigurskós. Móti Chile javnaði Ivica Vastic við einum skrúvandi skoti, eftir at Marcelo Salas hevði skorað eitt ivasamt mál. Og móti Italia skoraði Andreas Herzog við brotssparki í yvirtíðini. Men tá høvdu bæði Christian Vieri og Roberto Baggio skorað fyri Italia, sum altso vann 2-1.

## Seinastu úrslitini

Síðani Josef Hickersberger aftur varð settur í landsliðsvenjarasessin í 2006, hevur Eysturríki spælt 20 landsdystir. Av hesum hevur landið bert vunnið teir tríggjar. Teir 20 dystirnir hava verið móti hesum tjóðum: Kanada 0-2, Kroatia 1-4, Ungarn 1-2, Costa Rica 2-2, Venezuela 0-1, Liechtenstein 2-1, Sveis 2-1, Trinidad & Tobago 4-1, Malta 1-1, Ghana 1-1, Frakland 0-1, Skotland 0-1, Paraguay 0-0, Kekkia 1-1, Japan 0-0, Chile 0-2, Sveis 1-3, Fílabeinsstrondin 3-2, Ongland 0-1, Tunis 0-0

## Bólkarnir

**Bólkur 1**
Portugal
Svøríki
Danmark
Ungarn
Albania
Malta

**Bólkur 2**
Grikkaland
Ísrael
Sveis
Moldova
Letland
Luksemborg

**Bólkur 3**
Kekkia
Póland
Norðurírland
Slovakia
Slovenia
San Marino

**Bólkur 4**
Týskland
Rusland
Finland
Wales
Aserbadjan
Liktinstein

**Bólkur 5**
Spania
Turkaland
Belgia
Bosnia-Herzogovina
Armenia
Estland

**Bólkur 6**
Kroatia
Ongland
Ukraina
Hvítarusland
Kazakhstan
Andorra

**Bólkur 7**
Frakland
Rumenia
Serbia
Litava
Eysturríki
Føroyar

**Bólkur 8**
Italia
Bulgaria
Írland
Kypros
Georgia
Montenegro

**Bólkur 9**
Holland
Skotland
Noreg
Makedonia
Ísland